# Aðalorðaskifti á tingi um felags stev í útnorði



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fer at skjóta upp at hava aðalorðaskifti um fiskivinnupolitiska samstarvið í útnorði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Á ráðstevnuni hjá útnorðurráðnum í gjár segði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, at hann fer at skjóta upp, at aðalorðaskifti verður á tingi um tættari samstarv í útnorði**

ÚTNORÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Aftur og aftur verða ráðstevnur hildnar um áhugaverd og týðandi mál og viðurskifti, og summar av hesum eru framhald av øðrum ráðstevnum, sum hava verið frammanundan.

Nógv verður sagt, og orðini kunnu fella væl í oyruni. Tá ið dagur er lokin, verður farið til hús – og í fleiri førum hevur tú fingið okkurt at vita, sum tú ikki visti áður.

Herfyri vóru norðurlendskir fiskimálaráðharrar og embætisfólk úr Kanada og ES á fundi í Føroyum, og nú mikudagin og hósdagin hevur útnorðurráðið eisini havt sína 9. temaráðstevnu í Føroyum um fiskivinnupolitiskt samstarv í útnorði.

Aftur hesaferð vitja eitt nú fiskimálaráðharrarnir úr Íslandi og Grønlandi, ES-umboð og fólk úr Noregi.

Vanliga er semja eftir slíkar fundir og ráðstevnur um, at hesar eru áhugaverdar og gevandi, men tá ið tú hevur fylgt fleiri ráðstevnum, hevur tú hug at spyrja, hvørji ítøkilig úrslit nú einaferð spurdust burtur úr.

### Aðalorðaskifti

Á útnorðurráðstevnuni fyrrapartin hósdagin skuldu fiskimálaráðharrarnir í Føroyum, Íslandi og Grønlandi siga sína hugsan um, hvussu teir halda, at londini í útnorði kunnu samstarva á fiskivinnupolitiska økinum mótvegis ES.

Í røðu síni segði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, seg fara at skjóta upp, at Føroya løgting fer at hava aðalorðaskifti um, hvussu Føroyar kunnu verða við í einum tættari samstarvi á fiskivinnupolitiska økinum í útnorði.

Íslendski fiskimálaráðharrin, Árni M. Mathiesen, segði seg eisini vilja taka henda spurningin upp í Altinginum, og væntandi tók grønlendski landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Rasmus Fredriksen, undir við starvsbrøðrum sínum í útnorði.

Endamálið við útnorðurráðstevnuni er at samansjóða tey mál, sum londini kunnu standa saman um mótvegis umheiminum – og ikki minst mótvegis ES á fiskivinnupolitiska økinum.

### Pallborðsorðaskifti

Klokkan 13.15 í gjár varð lagt upp til pallborðsorðaskifti um fiskivinnupolitiskar spurningar í útnorði.

Luttakararnir við pallborðið vóru Egil Olsen, sum var orðstýrari, Anders Brøns, stjóri og ein av eigarunum av Polar Seafood, Jonathan Motzfeldt, grønlendskur landstingsmaður, Hendrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins, Røgnvaldur Hannesson, fiskivinnuøkonomur og professari við norska handilsháskúlan og Kristján Tórarinsson, formaður í íslendska reiðarafelagnum.



*Útnorðurráðstevnan viðgjørdi spurningin, hvussu Føroyar, Ísland, Grønland – og Noregi - kunnu standa tættari saman á fiskivinnupolitiska økinum mótvegis umheiminum – og serliga mótvegis ES*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Vilja styrkja fiskivinnusamstarvið í útnorði

**Útnorðurráðið, sum hevur havt ráðstevnu í Føroyum, er ein samstarvsfelagsskapur millum íslendska altingið, grønlendska landstingið og okkara heimliga løgting. Miðjað verður eftir at styrkja samstarvið millum londini mótvegis umheiminum – og ikki minst mótvegis ES**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikudagin og hósdagin vóru fleiri enn fimti politikarar, ráðharrar og serfrøðingar úr útnorði, Noregi og ES savnaðir á 9. temaráðstevnuni hjá útnorðurráðnum.

Ráðstevnan hevur verið hildin á Hotel Føroyum, og tosað hevur verið um fiskivinnupolitiskt samstarv í útnorði – saman við Noregi - mótvegis ES.

Formaðurin í útnorðurráðnum og íslendski altingslimurin, Birgir Ármannsson, sigur, at endamálið við ráðstevnuni var at samansjóða tey mál, sum londini í útnorði kunnu standa saman um mótvegis umheiminum – og ikki minst mótvegis ES.

Einki av londunum í útnorði, sum eru Føroyar, Grønland og Ísland, eru limir í ES, og londini hava heldur ikki eina felags »strategi« á fiskivinnuøkinum mótvegis felagsskapinum. Tó hava tær avgerðir, sum ES tekur, stóra ávirkan á londini í útnorði.

Útnorðurlondini ynskja í felag at fáa størri ávirkan á gongdina og fremjanina av felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES.

Soleiðis var niðurstøðan hjá útnorðurráðnum á seinastu ráðstevnuni eisini, at londini eiga at standa saman í fiskivinnuspurningum og í størst møguligan mun tosa við einari tungu til tess at fáa størstu ávirkanina á ES. Standa londini ikki saman, er vandi fyri, at ávirkanin á fiskivinnupolitikkin hjá ES verður lítil, samstundis sum útnorður gerst veikari og ES sterkari.

Millum røðararnar á ráðstevnuni á Hotel Føroyum vóru leiðandi ES-umboð, fiskimálaráðharrarnir í Grønlandi, Íslandi og Føroyum, norðmaðurin, Røgnvaldur Hannesson, fiskivinnuøkonomur og professari við norska handilsháskúlan, Asmund Kristoffersen, stórtingslimur og formaður í nevnd í Norðurlandaráðnum, Kjartan Hoydal, The North East Atlantic Fisheries Commission og Ásmundur Guðjónsson, fiskivinnuráðgevi hjá norðurlendska ráðharraráðnum.

Útnorðurráðið er ein samstarvsfelagsskapur millum íslendska altingið, grønlendska landstingið og okkara heimliga løgting. Hvørt landið er umboðað við seks tinglimum.